# Alitíðindi

**Fiskaaling p/f 430 Hvalvík**

**NR 2 - 1997**

# Alistøðir á sjónum

## Hagtøl fyri 1996

Andrias Reinert

### Inngangur

Í 1996 aldu 19 feløg fisk á sjónum. Nøkur av hesum feløgum hava fleiri aliloyvi, ella ala á fleiri støðum, sum verða rikin sum eindir fyri seg. Fyri jól í 1996 vórðu tí spurnarbløð send 23 alistøðum á sjónum, og tær 22 hava latið inn aftur tilfar um gongdina í alingini í 1996.

Hugaligt er at síggja, at alarar hesaferð sum heild hava gjørt sær enn meira ómak at svara teimum mongu spurningunum nágreiniliga, og hetta er, sum vera man fortreytin fyri, at nýtilig hagtøl um alivinnuna koma burtur úr hesum arbeiði.

Niðan fyri verður tikið saman um gongdina í alingini á sjónum í 1996.

### Alistøðirnar

Eitt aliloyvi er givið á Trongisvágsfirði í 1996. Minni virksemi hevur verið á onkrari alistøð, meðan aðrar hava lagt meira aliútgerð út. Somuleiðis er meira fiskur aftur á onkrum firðum, sum hava ligið brak vegna sjúku.

### Fiskur farin á sjógv í 1996

Sambært alistøðunum á sjónum eru 7,283 mill. laksasmolt og 346.000 síl farin í alinótirnar í 1996. Smoltini eru heldur fleiri, enn smoltstøðirnar góvu upp ( 7,116 mill.), meðan talið av sílum samsvarar heilt við talið frá smoltstøðunum.

Í Talvu 1 er fiskurin, sum er farin á sjógv, býttur upp eftir aliøki. Skilt er ímillum vár- og heystsmolt og samanborið er við fiskin, sum fór á sjógv í 1995.

Talva 1. Smolt og sjóbúgvin síl, (tald í 1.000), farin á sjógv í 1996

| | Vár | | Heyst | |
|---|---|---|---|---|
| | Laksur 1000 stk | Síl 1000 stk | Laksur 1000 stk | Síl 1000 stk |
| Norðoyar | 908 | | 1104 | |
| Eysturoy E. | 803 | | 1516 | 150 |
| Miðøkið | 840 | | 1133 | 160 |
| Vestanfyri | 701 | 36 | 85 | |
| Suðuroy | 193 | | | |
| Íalt í 1996 | 3445 | 36 | 3838 | 310 |
| Íalt í 1995 | 4116 | 441 | 3643 | 47 |

Tølini í talvuni oman fyri eru bruttotøl, ella talið av fiski, sum fór á sjógv, áðrenn svinnið tríggjar teir fyrstu mánaðirnar er roknað frá.

Vit síggja at meira fiskur fór á sjógv um heystið í 1996, enn um várið, og tað hendir longu 3. árið eftir, at alistøðir av álvara fóru undir at koyra laksasmolt á sjógv um heystið.

## Fiskur í sjónum pr.31.12.1996

Tal og vekt av laksinum av hvørjum árgangi, sum gekk á alistøðunum kring landið um árskiftið, er sett saman í Talvunum 2a - 2c. Skilt er ímillum aliøkini og somuleiðis millum vár- og heystsmolt. Roknaði tøl fyri eina alistøð eru við í hesi uppgerð. Ælabogasílini eru uppgjørd samlaði fyri alt landið.

Fyri at fáa eina ábending um gongdina í vinnuni er samanborið við støðuna pr. 31.12.1995.

**Laksur**

Laksur - árgangur 1995

Av teimum 4,1 mill. laksunum, sum vóru eftir av hesum árgangi pr.31.12.1996, vóru 45 % í Eysturoy E (41), 25 % í Norðoyum (28), 21 % í Miðøkinum (18 ), 7 % í Suðuroy (8) og 2% Vestanfyri (4).

Tølini í klombrum vísa, hvussu stórur partur av árgangi 94, (2,7 mill. fiskar), ið var í teimum ymisku aliøkjunum pr.31.12.1995.

Talva 2a. Laksur í sjónum, árgangur 1995 pr.31.12.1996

| Aliøki | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons |
| Norðoyar | 281 | 4,6 | 1292 | 559 | 1,2 | 665 |
| Eysturoy E | 595 | 5,1 | 3028 | 1213 | 1,5 | 1754 |
| Miðøkið | 513 | 4,6 | 2359 | 354 | 1,7 | 595 |
| Vestanfyri | 0 | | 0 | 88 | 1,8 | 154 |
| Suðuroy | 78 | 4,1 | 317 | 187 | 1,1 | 196 |
| Rokn.f.1 støð | 73 | | 350 | 120 | | 168 |
| Árg.95 pr.31.12.96 | 1540 | 4,7 | 7346 | 2521 | 1,4 | 3532 |
| Árg.94 pr.31.12.95 | 1738 | 3,9 | 6818 | 933 | 1,2 | 1126 |

Skilligt er, at serstakliga vársmoltini av 1995 árganginum eru vaksin munandi betur enn 1994 árgangurin, og eisini heystsmoltini -95 hava munin á -94 árganginum í støðd, umframt at væl meira er til.

Laksur - árgangur 1996

Við árslok vóru 6,4 mill. fiskar eftir av hesum árgangi (6,3), 31 % av laksinum var í Norðoyggjum (25), 28% í Eysturoy E. (37), 28 % í Miðøkinum (34), 10 % Vestanfyri (0,4) og 3% í Suðuroy (4,5). Tølini í ( ) eru árgangur 1995 pr. 31.12.1995.

Talva 2b. Laksur í sjónum, árgangur 1996 pr.31.12.1996

| Aliøki | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal 1000 | g/ stk | Tons | Tal 1000 | g/ stk | Tons |
| Norðoyar | 848 | 760 | 645 | 939 | 48 | 45 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eysturoy E | 750 | 686 | 515 | 1022 | 92 | 94 |
| Miðøkið | 721 | 815 | 588 | 1057 | 102 | 110 |
| Vestanfyri | 609 | 796 | 485 | 45 | 120 | 5 |
| Suðuroy | 168 | 494 | 83 | 0 | | 0 |
| Rokn.f.1 støð | 80 | | 60 | 120 | | 10 |
| | | | | | | |
| Árg.96 pr.32.12.96 | | 748 | | | 83 | |
| Árg.95 pr.31.12.95 | 3949 | 739 | 2917 | 2360 | 80 | 186 |

Lutfalsliga er so mikið meira farið burtur av heystsmoltunum, at um ársskiftið eru nærum líka mong vársmolt sum heystsmolt eftir í nótunum.

Vøksturin á 1996 árganginum líkist sera nógv undanfarna árgangi.

Talva 2c. Laksur íalt í sjónum pr.31.12.1996

| Árgangur | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal 1000 | Kg/stk | Tons | Tal 1000 | Kg/stk | Tons |
| 1994 | | | | 143 | 5,5 | 793 |
| 1995 | 1540 | 4,8 | 7346 | 2521 | 1,4 | 3532 |
| 1996 | 3170 | 0,8 | 2376 | 3183 | 0,1 | 264 |
| Laksur íalt | 4710 | | 9722 | 5847 | | 4589 |
| Laksur íalt vár- og heystsmolt | | | | 10557 | | 14311 |
| Laksur íalt pr. 31.12.1995 | | | | 7489 | | 11942 |

Við árslok 1996 gingu gott 3 mill. fleiri laksar ella 2.369 tons fleiri í aliringunum, samanborið við árslok 1995.

### Ælabogasíl

Meginparturin av vársílunum av 1995 árganginum eru tikin við árslok 1996, men skilliga sæst í Talvu 2d, at hesin árgangur var væl betur fyri, enn 1994 árgangurin var undanfarna ársskifti.

Talva 2d. Ælabogasíl í sjónum pr.31.12.1996 og pr.31.12.1995

| | Vársíl | | | Heystsíl | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Pr.31.12.1996 | Tal 1000 | Kg/stk | Tons | Tal 1000 | Kg/stk | Tons |
| 1995 árgangur | 173 | 3,8 | 648 | 168 | 2,5 | 421 |
| 1996 - | 30 | 1,2 | 36 | 326 | 0,1 | 32 |
| Íalt | 203 | | 684 | 494 | | 453 |
| Síl íalt, vár og heystsíl við árslok 1996 | | | | 697 | | 1137 |
| Pr.31.12.1995 | | | | | | |
| 1994 árgangur | 107 | 2,0 | 217 | 50 | 0,5 | 26 |
| 1995 - | 586 | 1,0 | 569 | 184 | 0,1 | 20 |
| Íalt | | | | | | |
| Síl íalt, vár og heystsíl við árslok 1995 | | | | 927 | | 832 |

Meðan meginparturin av sílunum í 1995 fóru á sjógv um várið, so er so at siga allur 1996 árgangurin heystsíl, sum eru farin á sjógv í Eysturoy E, og í Miðøkinum.

Sílini eru 230.000 færri í tali við árslok 1996, enn við árslok 1995, men viga tó góð 300 tons meira, enn sílini um somu tíð árið fyri.

Samanumtikið síggja vit í Talvu 2e niðanfyri, at stívliga 1,3 mill, fleiri fiskar og 3.569 fleiri tons av alifiski ganga á alistøðunum á sjónum kring landið við árslok 1996, enn um somu tíð í 1995.

Talva 2e. Tal og vekt av fiski íalt í sjónum við árslok 1995 og -96

| | 31.12.95 | | 31.12.96 | |
|---|---|---|---|---|
| | Tal | Tons | Tal | Tons |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | 1000 | | 1000 | |
| Laksur, árg. 1994 | 2671 | 7944 | 143 | 793 |
| Laksur, árg. 1995 | 6309 | 3103 | 4061 | 10878 |
| Laksur, árg. 1996 | | | 6353 | 2640 |
| Laksur í alt | 8980 | 11047 | 10557 | 14311 |
| | | | | |
| Síl, árg. 1994 | 157 | 243 | | |
| Síl, árg. 1995 | 770 | 589 | 341 | 1069 |
| Síl, árg. 1996 | | | 356 | 68 |
| Síl í alt | 927 | 832 | 697 | 1137 |
| | | | | |
| Fiskur íalt | 9907 | 11879 | 11254 | 15448 |

## Tøka av alifiski

Alistøðirnar geva so neyvar upplýsingar á spurnarbløðunum, at tað ber til at fylgja væl við, hvussu hvør einstakur árgangur hilnast, og eitt nú hvussu vársmolt roynast í mun til heystsmolt. Vektin er uppgivin sum rundur blóðgaður fiskur.

Í uppgerðini niðanfyri í Talvunum 3 a-b er ein alistøð tó ikki við.

Talva 3a. Laksur tikin í 1996

| | Fyrra hálvár | | | Seinna hálvár | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Árgangur | Tal 1000 | Kg/stk | Tons | Tal 1000 | Kg/stk | Tons |
| Vársmolt 94 | 1589 | 4,7 | 7523 | 266 | 6,3 | 1672 |
| Heystsmolt 94 | 50 | 4,0 | 202 | 539 | 4,2 | 2272 |
| Vársmolt 95 | 47 | 2,7 | 126 | 1060 | 4,8 | 5099 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tøka íalt | | | | | | |

Talva 3b. Síl tikin í 1996

| | Fyrra hálvár | | | Seinna hálvár | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal 1000 | Kg/st | Tons | Tal 1000 | Kg/ st | Tons |
| Árg. 1994 | 35 | 3,4 | 120 | 34 | 3,2 | 108 |
| Árg. 1995 | | | | 238 | 2,9 | 687 |

Tøkan av alifiski tilsamans í 1996, sambært spurnarbløðunum til alistøðirnar er tald saman í Talvu 3c, og til sammetingar er tøkan í 1995 í Talvu 3d.

Talva 3c. Alifiskur tikin íalt í 1996

| | Tal 1000 stk | Miðalvekt kg | Tons |
|---|---|---|---|
| Laksur | 3714 | 4,8 | 17663 |
| Ælabogasíl | 307 | 3,0 | 915 |
| Alifiskur íalt | | | |

Talva 3d. Alifiskur tikin íalt í 1995

| | Tal 1000 stk | Miðalvekt kg | Tons |
|---|---|---|---|
| Laksur | 2154 | 3,8 | 8281 |
| Ælabogasíl | 30 | 2,6 | 77 |
| Alifiskur íalt | 2184 | | |

Í Talvunum 3c og 3d er roknaði tøl fyri tøku av laksi á einari alistøð við. Talið er roknað sum miðaltal fyri tøku á øllum hinum alistøðunum.

Hvussu nógvur laksur, ið er tikin í teimum ymisku aliøkjunum, er greinað út í talvunum 11 a-c aftast í heftinum.

## Umrøða av nøgd av livandi fiski, felli og tøku

Árgangur 1994

Bert 143.000 fiskar eru eftir av hesum árgangi pr.31.12.1996, og tí ber til at gera eina heilt góða meting av, hvussu árgangurin hevur hilnast.

Talva 4a. Svinn í 1994 árganginum

| | Vár | Heyst |
|---|---|---|
| (Ein alistøð ikki við) | Tal 1000 | Tal 1000 |
| Farið á sjógv | 3690 | 1593 |
| Tikið í 1995 | 1248 | 0 |
| Eftir pr.31.12.1995 | *)1738 | 933 |
| Rokn.svinn pr.31.12.95 | 19 % | 41 % |
| | | |
| Tikið 1. hálvár 1996 | 1589 | 50 |
| Tikið 2. hálvár 1996 | 266 | 593 |
| Eftir pr. 31.12.1996 | 0 | 143 |
| | | |
| Tikið + eftir í sjónum | 3103 | 732 |
| Svinn pr. 31.12.1996 | 587 | 861 |
| Svinn í % av upprunatali | 16 % | 54 % |
| | | |
| Svinn íalt av 1994 árg. til 31.12.1996 27 % | | |

*) Tøkan av laksi í 1996 hilnast betur enn hendan meting av, hvussu nógvur fiskur er eftir av vársmoltinum við árslok 1995, og vit fáa tí ov stórt roknað svinn pr. 31.12.1995.

Árgangur 1995

Tilsvarandi meting av 1995 árganginum, út frá tølunum á spurnarbløðunum, sæst í Talvu 4b. Hendan meting er gjørd á nakað veikari grundarlagi, av tí at bert góð 1,1 mill. laksar av árganginum vóru tiknir um ársskiftið.

Árgangur 1996

Í seinasta Alitíðindi var uppgerð av svinni í góðum 82 % av 1996 árganginum aftan á at fiskurin hevði gingið tríggjar mánaðar á sjónum. Svinnið var býtt eftir í hvørjum ársfjórðingi, fiskurin var farin á sjógv, og í sambandi við hesa viðgerð av svinninum í laksaalingini á sjónum, taka vit hesi tøl upp aftur her í Talvu 4c.

Talva 4b. Svinn í 1995 árganginum

| | Vár | Heyst |
|---|---|---|
| (Ein alistøð ikki við) | Tal 1000 | Tal 1000 |
| Farið á sjógv | 3927 | 3419 |
| Tikið 1. Hálvár 1996 | 47 | 0 |
| Tikið 2. Hálvár 1996 | 1060 | 0 |
| Eftir pr. 31.12. 1996 | 1540 | 2521 |
| | | |
| Tikið + eftir í sjónum | 2647 | 2521 |
| Svinn pr. 31.12.1996 | 1280 | 898 |
| Svinn í % av upprunatali | 33 % | 26 % |
| | | |
| Svinn íalt av 1995 árg. til 31.12.1996 30 % | | |

Talva 4c. Svinn í 1996 árganginum

| | 1.ársfj. | 2.ársfj. | 3.ársfj. | 4.ársfj. |
|---|---|---|---|---|
| Farið á sj. -1000 fiskar | 151 | 2086 | 1725 | 1768 |
| Eftir 3 mánaðir seinni | 124 | 1927 | 1316 | 1611 |
| Svinn í % | 18 % | 8 % | 24 % | 14 % |
| Svinn í 3 mánaðir í 82 % av 1996 árganginum 13,6 % | | | | |

Viðmerkingar til stóra svinnið

Tølini í talvunum omanfyri vísa skilliga, at ov nógvur fiskur ferst í alivinnuni á sjónum í Føroyum, og serstakliga nógv misferst av smolti, sum fer á sjógv "óvanliga" tíð á árinum.

Vársmolt

Vár's moltið av árgangi 1994 var, sum vanligt várs molt hevur verið árini frammanundan, og 16 % av hesum fiski eru misfarin til árslok 1996. Várið 1995 er avgerandi broyting komin í. Fyri tað fyrsta er tað nógva av fiskinum av størra endanum, sum nú skuldi verið smolt undir vanligum umstøðum, longu farið á sjógv um heystið. Men eisini fer nú ljósstýrdur fiskur á sjógv heilt tíðliga á ári, og kemur undir heitið "vársmolt".

Heystsmolt

Eftir tølunum, sum alarar geva upp, eru heili 54 % misfarin av smoltinum, sum fór á sjógv á heysti 1994. Hetta var fyrsta árið, at munandi nøgd av smolti fór á sjógv um heystið. Eisini í 95 og 96 árgangunum er tó nógv svinn í heystsmoltinum, samstundis sum ljósstýringin sum nevnt somuleiðis ávirkar fiskin, sum nú fer á sjógv um várið.

Tað ber ikki til at seta tøl á, hvussu stórur partur av hesum svinni er orsakaður av:

- hesum nýggja máta at stýra smoltalingini,
- sjúku, sum furunkulosu og BKD á smoltstøðunum
- at ov smávaksin fiskur illa tolir streym, sjaskveður og lús á hávetri

## Svinn í laksaalingini í grannalondunum

Bretland

Á sama hátt sum vit hava gjørt omanfyri, geva skotar upp hvussu nógv fer fyri skeyti av hvørjum árgangi sær, og nøkur tøl fyri alivinnuna í Hetlandi og somuleiðis tøl fyri alt UK eru sett saman í Talvu 5.

Talva 5. Svinn í alingini í Hetlandi og í øllum UK

| | Svinn í % fram til tøku |
|---|---|

| Smolt-árgangur | Hetland | Alt U.K. |
|---|---|---|
| 1989 | | 42,1 |
| 1990 | | 38,4 |
| 1991 | 32,2 | 33,1 |
| 1992 | 28,4 | 21,1 |
| 1993 | 5,3 | 10,2 |

Her er munandi meira av laksinum komið til sættis ár um ár síðani 1989, sum var ringasta árið til felli hjá skotum. Koppseting móti furunkulosu er fremsta orsøkin til, at nú gongur betur í hond.

Svinnið í 1991/-92 árgangunum hjá skotum er á sama støði sum í okkara 1994 árgangi, men hjá okkum er síðani gingið øvugtan veg.

Í hesum sambandi kan nevnast, at av teimum 26,8 milliónunum av smolti, sum fóru í alistøðirnar í Skotlandi í 1995 vóru bert 2,5 mill. vanlig heystsmolt (S½ smolt), umframt 0,6 mill. veturgomul heystsmolt (S 1½).

Noreg

Norðmenn rokna svinnið í alingini á sjónum nakað øðrvísi. Teir leggja saman fyri allar árgangirnar av fiski, sum ganga á alistøðunum, hvussu nógv, ið ferst av sjúku, sleppur úr nótunum, ella ferst á annan hátt, og geva sostatt upp, hvussu mong % tilsamans av øllum alifiskinum í sjónum fara fyri skeyti hvørt árið.

Talva 6. Svinn í alingini í Noregi

| | Svinn í % hvørt árið | |
|---|---|---|
| Ár | Laksur | Síl |
| 1993 | 7,5 | 6,7 |
| 1994 | 5,9 | 4,5 |
| 1995 | 6,2 | 4,6 |

Heilsustøðan er batnað so munandi í alivinnuni í Noregi, at hóast norðmenn í 1996 aldu 290.000 tons av laksi og 20.500 tons av ælabogasílum, so varð bert 1 tons av antibiotika nýtt í allari alivinnuni í fjør.

22,4 % av tilsamans 99,8 milliónum smoltum, sum norðmenn koyrdu á sjógv í 1995, vóru heystsmolt, men síðanni varð aftur munandi minnið sett út av heystsmolti í 1996. Tað er tó væl bíligari at ala heystsmolt, og

norðmenn vænta, at alarar aftur fara at biðja um fleiri heystsmolt nú komandi heyst. Norsku heystsmoltini eru í miðal munandi størri, enn vit eru von við í Føroyum.

## Serlig viðurskifti

Fóðurnýtsla í 1996

Alistøðirnar hava sambært spurnarbløðunum tilsamans nýtt 27.688 tons av fóðri til fiskin á sjónum. Hetta samsvarar væl við uppgerðina av samlaðu nýtsluni av fiskafóðri, sum Havsbrún gjørdi fyrr í ár. Niðanfyri er uppgerðin hjá Havsbrún fyri trý tey seinastu árini:

1996 28.600 tons

1995 17.972 -

1994 17.550 tons

Fóður, nýtt á smoltstøðunum, er roknað við í tølunum hjá Havsbrún, og tí eiga millum 500 og 600 tons at verða drigin frá, fyri at finna nýtsluna til fiskin á sjónum.

Stívliga 10.000 tons meira av fóðri eru sostatt farin í alifiskin í 1996, enn tvey tey undanfarnu árini. Hetta sæst sum vera man aftur í munandi størri tøkuni í 1996, og harumframt gingu sum nevnt 3.569 tons fleiri av fiski á alistøðunum við árslok 1996, enn um árskiftið frammanundan. Hetta er ein vøkstur í "biomassa" uppá 30 % á alistøðunum á sjónum.

Gevingarhættir

Alistøðirnar bøta støðugt um útgerðina at geva fiskinum við. Eitt nú høvdu 10 støðir fóðurmiðstøð á landi ella á flaka, í mun til 7 støðir í 1995, og 12 alistøðir góvu frá báti við fóðurkanón í mun til 10 støðir í 1995.

Kynsbúning og ljós á alistøðunum

Fleiri støðir eru farnar at nýta ljós, sum eru niðri í sjónum, til fiskin. Á henda hátt kemur nógv størri partur av ljósinum til sættis, og ljósið er samstundis til munandi minni bága omaná. Niðanfyri er víst, nær støðirnar, sum hava givið upp, hava nýtt ljós.

Talva 7a. Tíðarskeið, sum ljós verður nýtt til fiskin á alistøðunum

| Frá | Til | Tal av støðum |
|---|---|---|
| November | maj | 2 |
| Desember | apríl | 1 |
| Desember | maj | 4 |
| Januar | apríl | 1 |
| Januar | maj | 6 |

| | | |
|---|---|---|
| Februar | maj | 1 |
| 6 alistøðir nýttu ikki ljós til fiskin | | |

Í alieindum við ongum ljósi verður í flestu førum uppgivið, at 5 -10 % av fiskinum verða kynsbúgvin, í einstøkum føri tó heili 25 %. Sera lítið og sjáldan meira enn 2 % búnast, har ljós verður nýtt. Niðanfyri er dømi um gongdina við ljósi og kynsbúning á eini alistøð.

Talva 7b. Dømi um ljós og kynsbúning á eini alistøð

| Ringa -ummál | Watt íalt | Slag av ljósi | Ljós tendrað | Ljós sløkt | Árg. av fiski | Kynsb. % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 96 m | 2800 | lágorku | 19.02 | 25.05 | vár 95 | 8,79 |
| 80 m | 1800 | - | 21.02 | 25.05 | vár 95 | 7,54 |
| 50 m | 1000 | - | 20.11 | 10.05 | heyst 94 | 0,00 |
| 40 m | 700 | - | 20.11 | 10.05 | heyst 94 | 4,22 |
| 40 m | 450 | lágorku | 20.11 | 10.05 | heyst 94 | 4,22 |
| Kynsbúning fyri allan árgang heyst 1994 2,62 % | | | | | | |

Tølini í hesum dømi kundu bent á, at tað er ov seint at seta ljós á fiskin um 20. februar.

Lús

Sera misjavnt er, hvussu illa alistøðirnar verða plágaðar av lús. Í talvuni niðanfyri siga tølini, hvussu mangar viðgerðir árgangurin, sum er oftast viðgjørdur fyri lús á eini alistøð, hevur fingið.

Talva 8. Viðgerð fyri lús í 1995 og í 1996

| | Tal av alistøðum | |
|---|---|---|
| | 1995 | 1996 |
| Eingin viðgerð | 7 | 5 |

| | | |
|---|---|---|
| Viðgjørt 1 - 3 ferðir | 9 | 9 |
| Viðgjørt 4 - 7 ferðir | 5 | 8 |
| Alistøðir ikki svarað spurninginum | 2 | 1 |

Tølini benda á, at lúsin hevur gjørt nakað meira um seg, nú nøgdin av fiski í sjónum er vaksin so munandi. Lúsaplágan hevur í 1996 verið ringast á ávísum økjum í Miðøkinum og Eysturoy E.

Smærra lúsaslagið (Caligus), gjørdi heilt nógv um seg víða um fyrra partin av vetrinum, og var m.a. atvoldin til, at væl av fiski fór fyri lægri prís, orsakað av reyðflekkuta farvegnum eftir lúsini. Samstundis sum nógvi toskurin aftur hvarv undan landi, hvurvu trupulleikarnir av "seiðalúsini" .

Sjúka

BKD sjúkan ger enn nógv um seg, og bert á 9 alistøðum er sjúkan ikki ávíst í 1996. Av alistøðunum, sum hava mist fisk av BKD, hava tær 5 ikki viðgjørt við heilivági, 7 støðir hava viðgjørt eina ferð, og bert ein alistøð hevur viðgjørt fiskin 3 ferðir. Svinnið av sjúkuni á sjónum verður uppgivið sum víst niðanfyri:

Svinn av BKD Tal av alistøðum

< 5 % 2

5 - 10 % 3

10 - 20 % 4

20 - 30 % 2

30 - 40 % 2

Bert lítil partur av fiskinum sum doyr verður kannaður, men einki er tó at ivast í, at ein partur av hesum svinni er elvdur av ymiskum øðrum orsøkum enn BKD.

Ein partur av lívfiskinum hevur seinastu árini fingið viðgerð, sum skal fyribyrgja at møgulig "fjald" BKD smitta í lívfiskinum, skal nørast víðari í rognunum.

Alistøðirnar á sjónum fingu fyrstu smoltini undan viðgjørdum lívfiski á

heysti 1996, og líkt er til at frískari lívfiskur og rogn, og tað at smoltstøðirnar eru farnar at sóttreinsa vatnið, fer at bøta munandi um teir stóru trupulleikar, sum BKD sjúkan hevur volt alivinnuni í Føroyum.

Tal av fólki

Tilsamans arbeiddu 117 fólk beinleiðis á alistøðunum á sjónum, samanborið við 104 fólk í 1996, eykahjálp íroknað.

## Útflutningstøl

Burtur úr útflutningslistunum frá Hagstovu Føroya hava vit tikið allan útflutning av alifiski og viðgjørdar

vørur úr alifiski, og roknað alt um til runda vekt av blóðgaðum fiski.

Hesin "lykil" er nýttur at rokna eftir:

- 100 % er rundur blóðgaður fiskur
- 85 % av rundari vekt = kruvdur fiskur
- 75 % av rundari vekt = avhøvdaður kruvdur fiskur
- 57 % av rundari vekt = flak við skræðu
- 49% av rundari vekt = skrædlað flak

Útflutningsvirðið í talvunum niðanfyri er úr somu listum, og í seinasta teigi í Talvunum 9a-b er roknað, hvussu stórt útflutningsvirði er komið burtur úr hvørjum kilo av blóðgaðum, ókruvdum alifiski.

Talva 9a. Útflutningur av sílum og prísgongd 1990 - 1996

| Ár | Útfl. tons | Rund vekt | Mill. kr | Kr/kg r.v. |
|---|---|---|---|---|
| 1990 | 46 | 61 | 2 | 28 |
| 1991 | 490 | 627 | 16 | 26 |
| 1992 | 544 | 800 | 20 | 25 |
| 1993 | 714 | 855 | 20 | 23 |
| 1994 | 409 | 540 | 11 | 21 |
| 1995 | 64 | 84 | 2 | 22 |
| 1996 | 584 | 785 | 14 | 18 |

Eftir hesum tølum hevur prísurin í 1996 verið umleið 4 kr minni, enn í 1995 fyri hvørt kg av sílum, roknað sum rund, blóðgað vekt.

Talva 9b. Útflutningur av laksi og prísgongd 1990 - 1996

| Ár | Útfl. tons | Rund vekt | Mill. kr | Kr/kg r.v. |
|---|---|---|---|---|
| 1990 | 11423 | 12843 | 435 | 34 |
| 1991 | 15732 | 17990 | 542 | 30 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1992 | 15967 | 18287 | 578 | 32 |
| 1993 | 15321 | 17582 | 468 | 27 |
| 1994 | 12433 | 15029 | 385 | 26 |
| 1995 | 6909 | 8943 | 231 | 26 |
| 1996 | 15561 | 20090 | 417 | 21 |

Umleið 5 kr færri eru fingnar fyri hvørt kg av laksi í 1996 í mun til 1995, vektin somuleiðis roknað sum rundur, blóðgaður fiskur.

Talva 10. Útflutningur av alifiski, samanborið við samlaða

útflutningin - skip ikki roknaði við.- Milliónir kr.

| Ár | Alifiskur útflutningur 1000 kr | Samlaður útflutningur 1000 kr | Alifiskur av samlaðum útflutningi |
|---|---|---|---|
| 1990 | 437 | 2314 | 19,9 % |
| 1991 | 558 | 2631 | 21,2 % |
| 1992 | 598 | 2398 | 24,9 % |
| 1993 | 488 | 2052 | 23,8 % |
| 1994 | 396 | 2026 | 20,3 % |
| 1995 | 233 | 1992 | 11,7 % |
| 1996 | 431 | 2302 | 18,7 % |

Hóast munandi prísfall á alifiski, samstundis sum samlaði útflutningurin er komin upp aftur á eitt støði sum fyrst í nítiárunum, eigur alifiskurin 18,7 % av útflutningsvirðinum í 1996, í mun til 11,7 % í 1995.

Tølini frá Hagstovuni fyri árið 1996 eru fyribils, og eiga at verða tikin við fyrivarni.

**Tøkk**

Umframt tøkk til alararnar fyri góða undirtøku við spurnarbløðunum, eiga Hagstovan, Havsbrún P/F, Enni

P/F og Fiskasjúkutænastan tøkk fyri tilfar, og fólk á Fiskaaling P/F fyri góð ráð og rættlestur.

***Fylgiskjal***

Laksur tikin í 1996 - hvørt aliøki sær

Talva 11a. Laksur tikin í 1996

| Árg ´94- | Fyrra hálvár | | | Seinna hálvár | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vársmolt | Tal 1000 | Kg/stk | Tons | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons |
| Norðoyar | 562 | | 2572 | | | |
| Eysturoy E | 632 | | 3234 | 266 | | 1.672 |
| Miðøkið | 358 | | 1525 | | | |
| Vestanfyri | 0 | | 0 | | | |
| Suðuroy | 37 | | 192 | | | |
| | | | | | | |
| Tøka íalt | | 4,7 | | 266 | 6,3 | 1.672 |

Talva 11b. Laksur tikin í 1996

| Árg ´94 - | Fyrra hálvár | | | Seinna hálvár | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Heystsmolt | Tal 1000 | Kg/stk | Tons | Tal 1000 | Kg/stk | Tons |
| Norðoyar | | | | 53 | | 198 |
| Eysturoy E | 45 | | 182 | 279 | | 1.171 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðøkið | 5 | | 20 | 138 | | 553 |
| Vestanfyri | | | | | | |
| Suðuroy | | | | 70 | | 350 |
| | | | | | | |
| Tøka íalt | 50 | 4,0 | 202 | 539 | 4,2 | 2.272 |

Talva 11c. Laksur tikin í 1996

| Árg. 95- | Fyrra hálvár | | | Seinna hálvár | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vársmolt | Tal 1000 | Kg/stk | Tons | Tal 1000 | Kg/stk | Tons |
| Norðoyar | 9 | | 30 | 448 | | 2.205 |
| Eysturoy E | | | | 190 | | 963 |
| Miðøkið | | | | 422 | | 1.925 |
| Vestanfyri | 38 | | 96 | | | |
| Suðuroy | | | | | | |
| | | | | | | |
| Tøka íalt | 47 | 2,7 | 126 | 1.060 | 4,8 | 5.099 |